átrúnaður

Lagt til rættis: Snorri Brend *snorri@sosialurin.fo*



orðið

## Hjá honum er eingin fordøming



*Hesa vikuna:*

**John S. Myllhamar**

"So er tá eingin fordøming fyri tey, sum eru í Kristi Jesusi"
(Rómverjabrævið 8, 1.)

Men tað er tað alla aðrastaðni. Uttanfyri hann, er tað einki annað enn fordømingar. Okkara søk hevur so veik bein at standa á, at dómurin er longu feldur. Tað er ikki so frægt, at tosa kann verða um mildari dóm. Vit eru fult og heilt sek. Gerningar okkara tala fyri seg; teir eru so gjøgnumtrongdir av synd, at teir kunnu ongantíð roknast fyri annað enn synd. Dómarin nýtist ikki so frægt sum at leita fram ta grein, vit skulu dømast eftir; tað er líkamikið, hvørja hann velur, tí vit eru sek í teimum øllum.

Tí má alt flytast, um nakar møguleiki skal vera fyri, at tað kann verða øðrvísi, enn vit hava uppiborið. Vit sjálv kunnu ikki broytast. So er bara eftir, um dómarin kann broytast. Og tað er tann løgni boðskapurin, evangeliið hevur til okkum, at júst tað kann lata seg gera, so at dómarin ikki longur er dómari, men verður ein frelsari ístaðin. Jesus Kristus, sum einaferð skal verða dómari okkara, hevur boðið okkum frammanundan at verða frelsari okkara. Um tað verður ført ígjøgnum, tá stendur okkara søk sterk. Nei, hon stendur ongantíð sterk; men so kann úrslitið gerast gott, tí hann ger okkara søk til sína søk og sína søk til okkara søk.

Tí er tað hann, vit mega leita til, fyri at alt tað, ið vit hava, verður fjalt av øllum tí, ið hann hevur. Tá verður als ikki talan um okkara, bara um hansara. Lat tað tí eisini vera so satt sum tað í veruleikanum eisini er, at vit bert eru glataðir syndarar. Tað kemur kortini ikki at telja nakað mótvegis tí, ið er nógv størri, at hann er frelsari okkara. Bara vit altso eru í honum.

Amen!

# Fara sum trúboðarar til Tanzania

**Gongur sum ætlað verða hjúnini Beinta og Havstein Klein send út sum trúboðarar til Tanzania í summar**

**Missión:** Tey hava búð í Noregi í nøkur ár, har Havstein hevur lisið gudfrøði á Missiónsháskúlanum í Stavanger tey seinastu sjey árini.

Tey bæði og børn teirra verða send út gjøgnum Heimamissiónina og Luthersk Missionsforening í Danmark. Tey fara inn í arbeiðið sum eitt annað føroyskt par – Heri og Malan Kjærbo úr Havn – vóru partur av.

Eftir ætlan skal Havstein undirvísa á einum bíbliuskúla, meðan Beinta, sum er sjúkrasystir fer at undirvísa í heilsu og øðrum.

Áðrenn tey koma so langt skulu tey fyrst á málskúla. Eftir tað sleppa tey av álvara til verka.

Havstein hevur royndir við evangelisering frá tíðini sum ungdómsskrivari hjá Heimamissiónini og Kristiligum Felagi fyri skúlaungdóm og lesandi – stytt KFS.

Nevnast kann, at hann eisini hevur verið í missiónspraktikk á Madagaskar.



*Havstein og Beinta Klein, saman við børnunum Dinnu og Lassa*
*Mynd: trubodin.fo*

# Kirkjan missir til sjónvarp og internet

**Bert tíggjundi hvør dani er so áhugaður í átrúnaðarligum spurningum at hann fer í kirkju.**

**Danmark:** Í november kemur út bókin "Gudstro i Danmark". Hetta er ein frágreiðing um trúarlívið hjá dønum.

Her verður millum annað greitt frá, at nógvir danir heinta teirra átrúnaðarligu input á netinum. Teir hitta Gud í sjónvarpi, í bløðum, leita á internetinum ella fara í biograf har filmar við trvídráttum í tvídráttum í tilveruni verða sýndir.

Frágreiðingin vísir kortini, at danir eru vorðnir meiri trúgvandi tey seinastu 35 árini: Í 1970 søgdu 61 % seg vera kristin, meðan talið í 1998 var vaksið upp í 69 %.

Staðfest verður hinvegin, at trúgvin ikki er uppá sama máta sum áður: Gud er vorðin ein góður vinur hjá dønum, og teir tora at tosa opið um hann.

- Gud vísir seg í tí góðu tíðini, sum samfelagið er í beint nú. Synd og helviti eru fólk karvandi líkasæl við. Vit hava tað so gott, at vit hava hug at hugsa um tey andaligu og religiøsu lutirnar í tilveruni.

- Men Gud er framvegis ein partur av danska siðaarvinum, óansæð um vit vilja góðtaka tað ella ikki, sigur annar maðurin handan frágreiðingina, Morten Thomsen Højsgaard.

## Felags ráðstevna um missión

**Willow Creek:** Á heysti komandi ár verður ein felags Willow Creek-ráðstevna eftir ætlan hildin í Norðurlandahúsinum, skrivar Trúboðin.

Í løtuni arbeiðir ein fyrireikingarbólkur við ætlanini, og er hann mannaður av Alfred Petersen fyri Heimamissiónina, Heðin Poulsen fyri Brøðrasamkomuna og Dánjal Petersen fyri Kelduna.

Willow Creek er ein samkoma í USA, sum hevur ment nakrar hættir at røkka teim kirkjufremmandu við gleðiboðskapinum.

## Skrivstovan flutt til Havnar

**Missiónsfelagið:** Hetta seinasta árið hevur skrivstovan hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnum verið í Klaksvík.

Nú missiónsleiðari teirra er farin í annað starv er skrivstovan flutt í missiónshúsið við Landavegin.

Hetta arbeiðið verður tí framyvir gjørt við sjálvbodnari arbeiðsmegi.

## Umvæla kirkjuna til hátíðardagin

**Dalur:** Tey seinastu árini hevur kirkjuráðið arbeitt við at dagføra Dals kirkju, nú hon verður 50 ár í oktober mánaði.

Uttan hevur kirkjan fingið nýggjan klæðning og tak, og nú verður arbeitt innandura, millum annað soleiðis at rørslubrekað fáa atgongd til kirkjuna.

Verkætlanin er mett at kosta 1,3 mió krónur. Í hesum tíðarbili er kirkjan stongd.

## Lovsongur leiðir nærri Gudi

**Havn:** Í døgunum 17. til 19. mai verður skipað fyri eini lovsongsráðstevnu í Filadelfia. Henda ráðstevnan leggur dent á at vísa, at gjøgnum lovsang kann Gud tala og møta menniskjum við teirra ymisku tørvum.

Á skránni verða millum annað workshops fyri sangskriving og tónleikarar, eins og víst verður á, hvussu sangur verður framførdur.

Undirvísarar verða Katrine Høgenhaug og Hanne Vinsten. Fyrrnevnda er lovsangspastor í danskari samkomu og hin musikkpastor í aðrari fríkirkju.

sosialurin